

## So tapti Nadal

Eftir at hava sett met við 31 sigrum á rað í French Open í Tennis, mátti Rafael Nadal púrasta óvæntað lúta móti svenska Robin Söderling. Söderling vann dystin í fjórða umfarið 6-2, 6-7, 6-4, 7-6, og so stóð greitt, at Nadal fyri fyrstu ferð yvirhøvur hevur tapt á Roland Garros. Við hesum eru meistararnir hjá bæði kvinnum og monnum úti, nú farið verður undir fjórðingsfinalurnar.

## Føroyingar hjálpa Frem

Frem er í tungum sjógvi. Í morgin skal felagið hava eina millión um hendi, um arbeiðarafelagið ikki skal fara av knóranum. Fólk hava higartil stuðla við góðum 250.000 krónum, og hjálp er eisini komin úr Føroyum. - Eg vóni, at mítt íkast er við til at tryggja, at vit eisini komandi árini fáa møguleika at síggja evnaríkar føroyskar leikarar í Frem-troyggjuni – eg vóni, at tað eydnast felagnum at bjarga sær, sigur Steffen Stumman Hansen, sum er búsitandi í Leirvík og hevur stuðlað, við heimasíðuna hjá Frem. Formaðurin Hans Hermansen er framvegis bjartskygdur. - Tað eru fjepparar hjá Frem í øllum kongaríkinum. Ja, vit hava eisini fingið íkast úr Føroyum og málingameistaranum í Gormfelt, sigur Hans Hermansen, formaður í Frem.

## Tillukku Jens Erik

**Super-veteranurin, sum hevur víst seg drúgvari enn teir flestu, heldur í dag 41 ára føðingardagin á næst ovasta sessinum á føroyska máltindinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir 10 umfør er myndin av ársins útgávu av Vodafone-deildini av álvara við at tekna seg.

Hóast 07 Vestur framvegis liggur á niðurflytingarplássi, so er eingin ivi um, at dagsins føðingardagsbarn telist millum heilt stóru profilarnar í fótbóltslandskappingini.

Sjálvur hevur Jens Erik skotið átta mál í ár, og saman við Tór-Ingar Akselsen og Hendrik Rubeksen hevur hann staðið fyri einum flottum álopsparti hjá 07 Vestur. Ein álopspartur, sum hevur viðført, at 07 Vestur hevur skotið fleiri mál enn bæði ÍF og KÍ tilsamans. Og einsamallir hava teir tríggir skotið 14 mál!.

Verjuparturin hevur tó ikki staðið mát hjá 07 Vestur, og tí ríður liðið framvegis sera tungt. Mánadagin tóktist liðið annars hava gjørt nóg mikið, men við trimum deyðbóltum sluppu meistararnir úr EB/Streymi úr saksinum, soleiðis at teir enn halda lív í vónini um at renna kapp móti oddaliðunum.

Har eru HB, Víkingur og NSÍ annars í fullari ferð við at draga frá restini. HB spældi javnt í trupla útidystinum á Toftum, og hóast tað er svárt at missa 3-1 leiðslu, so man talan vera um úrslit, sum HB-legan væl kann liva við móti form-sterku toftamonnunum. Víkingur vann aftur í grannauppgerðini, men skaðar merkjast væl hjá tunna hópinum.

Stóra brakið komandi umfarið – sum tó ikki verður fyrr enn um tvær vikur – verður, tá NSÍ vitjar í Havn. Higar til hevur NSÍ vunnið allar sínar útidystir, og halda tey hagtølini, eru útlit fyri, at oddurin tá telur tvey - og kanska trý – lið, sum øll eru ájøvn í stigum.

Í botninum er myndin framvegis, at KÍ er púrasta avbyrgt, og meðan 07 Vestur roynir at vinna seg upp um ÍF. Og ansar B36 sær ikki, kann árstalsfelagið eisini gerast partur av tí bólkinum. Ikki minst, tá hugsað verður um, at teir báðir næstu dystirnir eru móti ÍF og KÍ. Hesa ferð tapti B36 á Argjum, har eingi tekin um niðurflytingarvanda eru at hóma. Tvørtur ímóti hevur AB við einum einstøkum undantaki prógvað, at teir kunnu geva einum og hvørjum liði í deildini dygga mótstøðu. Ikki minst á Argjum, har tað bert er Víkingur, sum hevur vunnið í ár.

# Árið hjá Chelsea bjargað

**Guus Hiddink fekk enn eitt steyp til høldar**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Hóast hann alla tíðina visti, at starvið í Chelsea bara var fyribils, so staðfesti hollendski venjarin hjá Chelsea, at talan var um eitt sorgblítt farvæl, tá hann saman við spælarunum hevði fegnast um FA-Cup sigurin*

*Mynd: Polfoto/AP*

Leygardagin var finalan í heimsins elstu fótbóltskapping – FA cup – á Wembley leikvøllinum í London.

Chelsea vann finaluna 2-1, men tað var kortini Everton sum byrjaði best. Everton gav bóltin upp, og teir fóru beinleiðis í álop. Eitt innlegg úr vinstru bleiv bara lutvíst ruddað burtur av Chelsea. Bólturin endaði hjá Fellaini, sum beindi bóltin yvir til fraklendingin, Louis Saha, sum bankaði bóltin í netið. Tá vóru bert 25 sekund farin av dystinum, og er talan um skjótastu skoring í einari FA Cup finalu nakrantíð. Gamla metið átti Roberto di Matteo, sum spældi við Chelsea, tá gamal metið var sett. Í FA Cup finaluni í 1997 skoraði di Matteo aftaná 43 sekund í finaluni ímóti Middlesbrough.

### Chelsea tók yvir

Chelsea tók meir og meir yvir, og tá 21 minuttir vóru farnir javnaði London-liðið til 1-1.

Florent Malouda sendi bóltin inn til Didier Drogba, som stútaði bóltin framvið Tim Howard í Evertonmálinum til javnleik 1-1. Tá ein tími var farin var Nicolas Anelka spældur leysur av Frank Lampard, men fraklendingurin lobbaði bóltin við síðunnar av málinum.

Lítla løtu seinni fekk Louis Saha ein stóran málmøguleika, men hann stútaði bóltin upp um málið.

Tá 72 minuttir vóru farnir, skoraði Chelsea sigursmálið. Frank Lampard fekk góða tíð til at leggja sær bóltin til rættis, og frá 20 metra fjarstøðu setti hann bóltin í netið til 2-1 til Chelsea. Løtu seinni hevði Chelsea møguleikan til at koma uppá 3-1. Florent Malouda skeyt eitt dundurskot frá 30 metra fjarstøðu, sum rakti yvirleggjarin og fór niður á málstrikuna, har Tim Howard fekk fangað returin. Everton royndi at stríðast, men teir komu ikki til nóg nógvar málmøguleikar, og máttu boyggja seg fyri yvirmaktini.

### Seinasti hjá Hiddink

Dysturin gjørdist tann seinasti hjá Guus Hiddink, sum Chelsea-venjari, men Chelsea-venjarin hevði ikki hug at feira sigurin.

– Eg má fara beina leið avstað, fyri at fyrireika russiska landsliðið til tann komandi HM-kvalifikasjónsdystin, segði Hiddink við enska blaðið, Daily Mirror.

Hiddink er nøgdur við, at tað hevur eydnast honum at lyfta liðið ta tíðina hann hevur verið venjari hjá Chelsea.

– Vit hava fyrireikað okkum væl. Steypakappingin hevur stóran týdning, og tað hevur stóran týdning at vinna eitt heiti hetta kappingarárið. Vit eru ovurfegnir um sigurin, staðfesti Hiddink.

Kortini er tað rættiliga hugtungt hjá hollendska meistaravenjaranum at skulu fara úr London.

– Eg havi sagt farvæl fyrr í øðrum størvum, men aftaná at hava arbeitt saman við spælarunum, og teimum sum starvast rundan um liðið, so gerst tað rættiliga kensluborið at siga farvæl.

Guus Hiddink sigur seg havai dámt hvønn minutt í starvinum sum venjari hjá Chelsea. Talan er um fimta FA Cup steypaheiti hjá Chelsea. Chelsea hevur áður vunnið FA Cup kappingina í 2007. Guus Hiddink hevur áður, sum venjari vunnið steypakappingina í Hollandi fýra ferðir. FA cup kappingin er fyrsta steypakappingin, sum Hiddink vinnur uttanfyri heimlandið.